# Tað er hundrað, sum er til




**- Lidnu loysnirnar, tá ið um menniskjaliga menning ræður, eru autoriterar, og tað, sum er autoritert, byggir ikki á autoritet, men á makt, og oftast á einstreingjaða makt. Tað er tí, tað er so umráðandi at læra at liva við tí ólidna. Tað er óautoritert og gevur tí pláss fyri skiftandi autoritetum, segði Pauli Nielsen, rektari á Føroya Læraraskúla, í útskrivingarrøðu seinasta fríggjadag, tá ein pedagogflokkur fekk handað prógv**

RØÐA

Miðskeiðis í januar mánaði hevði Læraraskúlin vitjan av góðum fólki úr grannalondunum. Her var Ólafur Proppé, rektari á Kennaraháskóla Islands, sum eins og Føroya Læraraskúli bæði hevur pedagogútbúgving og læraraútbúgving. Hann greiddi okkum frá, hvussu íslendingar royna at laga sínar útbúgvingar og sína gransking á útbúgvingarøkinum eftir egnum tørvi og egnum mátti, men alla tíðina í altjóða ljósi. Her var eisini Mogens Nielsen, gamli og navnframi professarin í pedagogikk á Læraraháskúlanum í Keypmannahavn. Hann legði okkum eina við at geva pedagogum og lærarum eina frælsa útbúgving, og síðani í áliti leggja dagliga arbeiðið í hendurnar á teimum. Ein tílík útbúgving sum læraraútbúgving og pedagogútbúgving, er ikki ein skrá, men ein menningartilgongd.

Væl vitandi, hvussu bundin vit altíð hava verið av gongdini á útbúgvingarøkinum í Danmark, ávaraði hann ímóti at halda, at allar danskar loysnir á útbúgvingarøkinum eru góðar loysnir. Triði gesturin var heimskendi svenski professarin í pedagogikk, Gunilla Dahlberg, sum serliga hevur granskað á øðrum av teimum økjunum, sum tykkara útbúgving fevnir um — smábarnaøkinum. Tá ið hon fór, fekk eg eina nýkomna svenska bók frá henni. Bókin ber heitið: “Hundra sätt at tänka“, og er um kendu barnagarðarnar í italsku kommununi Reggio Emilia.

Á aftastu síðu las eg hetta: “Vegna tær mongu mangan misvísandi tulkingarnar víða um lond av hugmyndafrøðini, sum liggur undir arbeiðinum í barnagørðunum í Reggio Emilia, mugu allir prentlutir, sum nýta myndir frá Reggio Children, prenta henda tekstin: “Sjónarmiðini, sum koma til orða í hesum prentluti, eru rithøvundanna og umboða teirra tulking av hugmyndafrøðini og virkseminum í barnagørðunum í Reggio Emilia. Innihaldið er ikki alment góðkent av Reggio Children ella kommununi í Reggio Emilia, og tí er ikki vist, at tað umboðar sjónarmiðini hjá teimum.””

Onkur heldur kanska, at hetta er ein løgin smáligheit, sum her kemur til sjóndar, men tann, sum veit eitt sindur um hugmyndafrøðina undir starvsseminum í Reggio Emilia, veit, at her fyrst av øllum fjalir seg óttin fyri avleiðingunum av pedagogiskum lánum.

Øll vitjandi, sum koma til barnagarðarnar í Reggio Emilia, fáa at vita, at tað, ið tey har gera, er vaksið fram í teirra egna jørðildi, men í støðugum samskifti við umheimin. Lokalt “nærsýni” og altjóða opinleiki er pallurin, sum teirra menning sprettur úr. Og tað er vegurin, sum Reggio Emilia ræður øðrum til at ganga.

Hugsið sjálv og hyggið uttan um tykkum. Hetta hava verið og eru hyggjuráð, sum tíverri sjaldan verða fylgd Á útbúgvingarøkinum eru vit nøkur, sum leingjast eftir meira av tílíkum hugburði her hjá okkum. Tí lív er hugsan, og verður framt av tíð til hugsan.

Men í staðin freistast vit at leita eftir loysnum hjá øðrum og taka tær til okkara, tí tað er so nógv lættari enn at menna hugsjónirnar í samskifti við onnur. Kanska er tað tí, at tað hjá nógvum á okkara døgum ræður meira um at vekja ans og at vera ansalig, heldur enn at fara við ansni.

Hava vit lidnu loysnina, sanna vit tað, sum Piet Hein sigur í einum av sínum tiltiknu grukkum:

Mensker
er gode
på bunden
sae fanden
de vil ikke
forbedre
sig selv men
hinanden

Men er tað tað, sum vit vilja? Lidnu loysnirnar, tá ið um menniskjaliga menning ræður, eru autoriterar, og tað, sum er autoritert, byggir ikki á autoritet, men á makt, og oftast á einstreingjaða makt. Tað er tí, tað er so umráðandi at læra at liva við tí ólidna. Tað er óautoritert og gevur tí pláss fyri skiftandi autoritetum.

Loris Malaguzzi, sum er stóri autoriteturin aftan fyri arbeiðið í Reggio Emilia, altíð verdur at lurta eftir, vísir alla tíðina á tað ríka barnið — dregur fram møguleikarnar heldur enn avmarkingarnar, sum vit ofta kunnu hava lyndi til. Hann hevur skrivað lívgandi ljóð um børnini, og um teir møguleikar, sum í teimum búgva. Yvirskriftin er:

Tvørturímóti
tað er hundrað, sum er til!

Eitt barn
er gjørt av hundrað

Barnið hevur
hundrað mál
hundrað hendur
hundrað tankar
hundrað hættir at hugsa
at spæla og at tala
hundrað altíð hundrað
hættir at lurta
at undrast
at halda av
hundrað lystir
at syngja og skilja
hundrað heimar
at finna uppá
hundrað heimar
at droyma sær til

eitt barn hevur
hundrað mál
(og hundrað hundrað
hundrað aftrat)
men verða rænd
tey nítiníggju.
Skúlin og mentanin
skilja høvur frá kroppi.

Tey biðja børn:
hugsa uttan hendur
virka uttan høvur
lurta men einki siga
skilja uttan gleðina
at hugfangast og fegnast
annað enn á jólum og á
páskum.

Tey biðja tey:
finna tann heim
sum longu er til
og av øllum hundrað
ræna vit teir nítiníggju

Tey siga teimum:
at spælið og arbeiðið
tað veruliga og tað
ímyndaða
vísindin og hugflogið
himinin og jørðin
skilið og dreymarnir
eru fyribrigdi
leys av hvørjum øðrum.

Tey siga teimum:
at tað ikki eru hundrað
Men børnini siga:
Tvørturímóti,
tað er hundrað, sum er til.

Vitjanin, vit høvdu í januar, er sprottin og íkomin av tílíkari hugsan, sum eg havi røtt um í dag. Vit her á Frælsinum eru tað einasta staðið, og tí eisini tað frægasta, sum vit eiga at útbúgva tykkum, sum vilja nýta vit og skil og atbeiðsorku tykkara í pedagogiskum arbeiði við børnum og við vaksnum, sum tørva serstakt atlit.

Tað er ein heitur biti, at taka tílíkt verk á seg.

Her sum nógva aðra staðni, og vit, ið starvast her, høvdu ynskt, at vit fingu betri stundir at fóta okkum í okkara dagliga starvi. Tað hevði spurst aftur.

Við hesum orðum vil eg ynskja tykkum og øllum tykkara hjartaliga til lukku, nú tit eru liðug við útbúgvingartíðina her á Læraraskúlanum. Vónandi hava tit lært so mikið hesi árini, at tit fara at sanna, at tit hava nógv eftir at læra.

# ítróttur

Nr. 30 • mikudagur • 13. februar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## Tað snýr seg um at vera bæði kaldur og uppsettur

**Landsliðsvenjarin heldur tað vera óðamannaverk, um føroyingarnir seinnapartin í dag fara á vøllin á Kypros við tí hugburðinum, at teir eru stórfavorittar**

LANDSDYSTUR
*Jóannes Hansen*

Tíðliga seinnapartin í dag fer føroyska fótbóltslandsliðið aftur í eldin niðri á Kypros. Talan er um 80. altjóða skrásetta landsdystin og mótstøðuliðið er eitt av teimum, sum føroyingar hava vunnið á í seinsta dystinum, sum liðini hava spælt ímóti hvørjum øðrum.

Jógvan Martin Olsen, sum hevur ábyrgdina, nú landsliðið er á venjingarlegu, var við í Liktinstein fyri knøppum tveimum árum síðani. Tá var hann hjálparvenjarin hjá Allani Simonsen. Jógvan Martin heldur, at royndirnar frá tí ferðini eiga at fáa føroyingarnar at taka uppgávuna í dag í stórum álvara!

– Vit vunnu 1-0. Men eg minnist væl, hvussu spælið myndaðist. Í verjuni manglaðu onkrir av føstu monnunum, men í álopspartinum vóru allir tøkir. Kortini høvdu vit í 1. hálvleiki stórar trupulleikar. Liktinstein hevði einar tríggjar stórar møguleikar, og tað var bara tí, at Jens Martin Knudsen fleiri ferðir hevði meistarligar bjargingar, at vit hildu tætt. Síðsta hálva tíman høvdu vit meiri orku, vit høvdu fleiri møguleikar, og vit skoraðu sigursmálið.

### Spælstýringin

Bæði Føroyar og Liktinstein kenna væl leiklutin at vera trýst og kroyst í 90 minuttir. Í dag verður tað øðrvísi, og so er spurningurin, hvussu tað fer at eydnast at mynda framrættaða spælið. Á altjóða styrkislistanum eru Føroyar hægri, enn Liktinstein er. Men venjarin vil ikki hava, at hansara menn eru ov fokuseraðir á álopið:

– Stóra avbjóðingin verður at fáa spælararnar at vera so uppsettar, sum teir vóru sunnukvøldið. Teir eru ikki í fullgóðari venjing enn, og tað sigur seg sjávlt, at tað kostaði nógv – bæði kropsliga og sinniliga – at spæla ímóti Póllandi. Takið er at fáa sannført spælararnar um, at tað krevst sami hugburður og sama stríð í dag sum sunnukvøldið, um vit skulu vinna á Liktinstein.

Ætlar tú at geva spælarunum leysari teymar í álopsspælinum?

– Í útgangsstøðuni skulu vit spæla akkurát, sum vit gjørdu sunnukvøldið. Vit skulu hava tol, vit skulu ansa økjum, og vit skulu vera klárir, tá álopsmøguleikarnir vísa seg. Hóast Pólland hevði bóltin meiri enn vit, so megnaðu teir ikki at leggja so ógvusligt trýst á okkara verju. Síðuspælararnir hjá okkum vóru týdningarmiklir ímóti Pól landi, og aftur ímóti Liktinstein fara Jákup á Borg og Heðin á Lakjuni at vera lyklaspælarar í framrættaða partinum, staðfestir venjarin.



*Virkandi landsliðsvenjarin er ikki av teirri fatan, at føroyska liðið kann meta seg sjálvt sum favoritt ímóti Liktenstein*

### Eru á heimavølli

Dysturin ímóti Póllandi varð spældur í Limasol. Í dag verður spælt í Paplos. Føroyingarnir búgva dygst uttanfyri býin, og teir skulu spæla á vøllinum, sum teir hava havt allar venjingarnar á, síðani teir komu niður á Kypros. Tískil kunnu vit siga, at talan er um eitt slag av heimavølli hjá føroyska liðnum.

Í fyrradagin vandu føroyingarnir bara klokkan ellivu fyrrapartin. Teir hvíldu seg og vóru í býnum og keyptu seinnapartin. Í gjár vandu teir klokkan ellivu og ætlanin var at venja aftur klokkan fimm.

– Umstøðurnar á gistingarhúsinum eru sera góðar, og tá vit støðugt hava venjingarvøllin tøkan, kunnu vit ikki siga annað, enn at fyritreytirnar hava verið góðar at fyrireika okkum til dystin ómóti Liktinstein. Nú ræður um, at spælararnir eru kaldir og ikki leypa framav, og at teir leggja alla orku í, sigur Jógvan Martin Olsen.

## Liktinstein fær tríggjar møguleikar

**Teir skulu í ár spæla tvær ferðir ímóti Føroyum og eina ferð ímóti Luksemborg og Allani Simonsen**

LANDSDYSTUR
*Jóannes Hansen*

Í Liktinstein vilja teir fegnir standa seg betri í fótbólti, enn teir hava gjørt higartil. Í síðstu HM undankappingini fingu teir einki stig, og vánirnar fyri, at teir skulu fáa nakra serliga úrtøku burturúr komandi EM undankappingini, eru einki serligar. Ivaleyst eru teir betri fyri fíggjarliga, enn FSF er, men tað man kortini koma væl við, at teir eru komnir í EM undankappingarbólk saman við Onglandi.

Um Liktinstein skal hugsa um at vinna onkran landsdystin, so er sannlíkið størst fyri tí, tá teir spæla vinardystir ímóti tjóðum, ið verða styrkismettar á umleið sama støði sum Liktinstein.

Í ár hava teir í Liktinstein tríggjar landsdystir á skránni ímóti sovornum fótbóltstjóðum – tveir ímóti Føroyum og ein ímóti Luksemborg. Umframt dystin ímóti Føroyum í dag skulu Føroyar og Liktinstein spæla aftur í august. Dysturin verður í Føroyum 15. august. Tá Føroyar í apríl 2000 vóru í Liktinstein varð avrátt, at teir skulu koma henda vegin í 2002.

Allan Simonsen og landsliðið úr Luksemborg eru í hesum døgum í Cadiz í Spania, har teir fyrireika seg til komandi EM undankappingina. Teir spældu leygardagin ímóti Vejle, sum uttan Christian Høgna Jacobsen í liðnum vann 4-2 ímóti liðnum hjá mesta kenda Vejle spælaranum nakrantíð.

Fótbóltssambondini í Luksemborg og Liktinstein hava gjørt avtalu um, at tey skulu spæla landsdyst í Luksemborg mikudagin 127. apríl.

Men nú snýr tað seg hjá Liktinstein um dystin ímóti Føroyum í dag. Og teir taka uppgávuna í stórum álvara. Liktinstein er ikki á venjingarlegu á Kypros. Teir komu suður á Kypros mánakvøldið, og teir fara til hús aftur beinanvegin eftir dystin.

Spælarahópurin hjá Liktinstein er samansettur umleið á sama hátt, sum hann var, tá teir fyri tveimum árum síðani spældu ímóti Føroyum. Tað vil siga, at teir flestu spælararnir eru úr høvuðsstaðarfelagnum Vaduz. Einstakir spælarar eru skrásettir í sveisiskum feløgum, eitt nú Grashopper Zürich, FC Zürich og BSC Young Boys, men tað er ikki altíð, at hesir eru á besta liðnum.

Kendasti spælarin hjá Liktinstein er Mario Frick. Hann spælir í Hellas Verona í Italia. Tað er felagið, sum Prben Elkjær í síni tað var við til at gera til italskan meistara. Nú er Verona í næstabestu deildini. Mario Frick er ikki við landsliðnum hjá Liktinstein, nú teir eru ein svipp suðuri á Kypros.